# Pætur vann fyrstu bowling kappingina



Teir bestu í fyrstu bowlingkappingin fyri vaksin, sum varð hildin í Havn farna vikuskiftið

**Seinasta vikuskiftið var fyrsta skipaða bowling kappingin fyri vaksin hildin í Havn. Pætur Háberg Johannesen gjørdist vinnari**

BOWLING
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin varð skipað fyri Carlsberg Cup í bowling. Kappingin fór fram í Bowlinghøllini á Hálsi í Havn, og 72 fólk teknaðu seg til kappingina.

– Bowlinghøllin hevur bert eitt ár á baki, og vit kunnu ikki vera annað enn nøgdir, tá fólkið vísir so stóran áhuga, halda fyrireikararnir.

Bowlinghøllin skipaði sjálv fyri kappingini, og hetta var fyrsta kappingin fyri vaksin. Frammanundan hava tvær kappingar verið fyri børn.

Kappingin byrjaði leygarmorgunin klokkan 9 og helt fram til kl. 17 uttan steðg.



*Tað ráddi um at sikta væl og tveita rætt, tá kúlan skuldi fáa keylurnar um koll*

### Tríggir í finaluni

Kappast varð eftir cupskipanini, og tað vil siga, at tann, sum tapti ein dyst, var úti av kappingini. Kappast var í innleiðandi umførum, og síðani vóru fjórðingsfinalur, hálvfinalur og finala.

Tríggir luttakarar komu í finaluna, og teir kappaðust so um at verða best.

Endin var, at Pætur Háberg Johannesen vann kappingina við 169 stigum. Mikael Johannson varð nummar tvey við 166 stigum, og Jón Haraldsen nummar trý við 158 stigum.

Bestu seriu í kappingini hevði Herman Jespersen við 224 stigum.

Atlantsflog, Jungmann og Skálkur lótu teimum bestu vinningar. Kappingin varð eisini stuðlað av Carlsberg og Coca Cola.

# Ingi venur aftur

**Ingi Højsted er farin undir venjingina í Arsenal aftur**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Ingi Højsted er nú farin undir bóltvenjingina aftur í Arsenal.

Seinastu vikurnar hevur hann ikki fingið vant, tí hann breyt beinið í NM-kapping fyrui U17 landslið, sum var í Danmark í august.

Nú er Ingi komin fyri seg aftur, og alt tykist vera í lagi við beininum.

Ingi hevur sáttmála við Arsenal, og hann hoyrir til U17 liðið hjá felagnum. Hetta liðið hevur staðið seg sera væl í landskappingini higartil.



*Ingi Højsted er nú komin yvir beinbrotið og er farin í gongd við bóltvenjingina aftur*

# Landsliðið í stavbólti til NM

**Mótstøðan var stór, tá føroyska manslandsliðið í stavbólti var við í norðurlendska meistaraskapinum**

ÍSB
*Eyðun Klakstein*

Fyri góðari viku síðani sendi Ítróttarsambandið fyri Brekað og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli føroyska manslandsliðið í stavbólti til Danmakar at dystast um norðurlandameistaraskapin.

Við í kappingini vóru Svøríki, Finland, Føroyar og Danmark.

Stavbóltur er nýggj ítróttagrein í Føroyum. Føroyingar hava vant hesa greinina í góð trý ár.

Undan fráferðini var stórur spenningur um, hvussu okkara menn fóru at roynast. Og sigast kann ikki annað enn, at føroyingar fingu seg royndar.

Mótstøðumennirnir vóru væl betri fyri, enn vit høvdu roknað við; teir leiktu stavbólt á høgum stigi, høvdu vant í nógv ár og vóru bæði kvikir og kringir. Okkara menn taptu stórt, men teir lærdu nógv og settu sær fyri, at tá ið norðurlandameistaraskapurin verður aftur í Finlandi um 2 ár, skulu vit standa okkum væl betur.

Á føroyska landsliðnum vóru Jørgen av Vollanum, liðskipari, Øssur Guðmundarson, Theodor Esmar Hansen, Elvin Weihe, Andur Mýri, Símun Petur Zachariasen, Júst í Túni, Jimmy Nielsen, Rói Wardum, Jonhard Haraldsen og Lennart Magnussen.



*Hetta er landsliðið í stavbólti, sum ÍSB og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli sendi til Danmarkar til norðurlendska meistarakapping*

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 2. november til hósdagin 8. november

# Fyrsti fongurin




*Feðgarnir báðir Eiler og Sámal Jacobsen royna saman eftir sild við Krúnborg. Hetta er fyrstu ferð, at Sámal skal royna seg sum skipara á sildaveiðu, og tá er gott at hava ein royndan mann sum Eiler við á túrinum. Eiler er ein av teimum royndastu skiparunum í Føroyum, og onkur góð ráð kann hann teska í oyrað á soninum. Leiðin gongur norður til Jan Mayen, og síðani til Noregs at selja.*

*Lagt til rættis: Zacharias Hammer. Klipt: Ragnar A. Jacobsen og Zacharias Hammer. Fotograferað: Zacharias Hammer og Árni Conradsson.*

*Sendingin verður endursend hósdagin kl. 19.25.*

# The Blair Witch Project

*- amerikanskur filmur frá 1999*

*Hetta er ein tann filmurin, sum hevur klárað at skapt mest rok í filmssøguni. Filmurin byggir á gomlu mytuna um Blair Witch. Tríggir ungir filmskúlanæmingar stevna til fara til Black Hills skógin í Maryland fyri at gera ein dokumentarfilm um Blair Witch. Eitt ár seinni verða bondini funnin niðurgrivin, og eingin hevur sæð tey trý síðani tey løgdu leiðina inn í skógin.*




## Fres




## Rangt og rætt 3:8




## Gesturin 8




## Okkara matstovur

